| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>17. februar 2005 | Blað nr.: **6095**<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **17. februar 2005**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **30/05-53/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jan Christiansen
Jógvan Arge
Katrin Dahl Jakobsen
Sjúrður Olsen
Leivur Hansen
Bjarti Mohr
Hildur Eyðunsdóttir
Høgni Mikkelsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Marin Katrina Frýdal
Beate L. Samuelsen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**34/05** **200500038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið til eftirtektar.

**35/05** **200301854**

**Hølisviðurskifti hjá kommunulæknanum í Kollafirði**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við útbygging av Kollafjarðar skúla varð tørvur á at flyta kommunulæknan úr viðtaluhølunum á skúlanum. Sum ein fyribilsloysn varð avgjørt, at brúka gamla skúla til viðtaluhøli, og at arbeiðið at kanna og lýsa tølistørtørvurin helt fram.

Arbeiðsbólkur læt gera byggiskrá til nýggj viðtaluhøli. Í byggiskránni var hædd eisini tikin fyri hølum til heimasjúkrasystrina.

Plandeildin vísti á nýggja miðstaðarøkið, har møguleiki skuldi verið at bygt læknahølini norðan fyri nýggju ítróttarhøllina og skúlan.

Sambært byggiskránni verður støddin 186 m² brutto. Samlaði byggikostnaðurin við 6,25% mvg er mettur til kr. 3.348.000.

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæltu til at góðkenna byggiskránna, dagfest januar 2004, og at játtaðar vóru kr. 300.000 á íløguætlanini fyri 2004 til projektering og útbjóðing.

**Sosiala nevnd 3. februar 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum og játta kr. 300.000,- av íløguætlanini fyri 2004 til projektering og útbjóðing.

Tá dispositiónsuppskot er gjørt, skal málið samb. mannagongd í sambandi við bygging av kommunalum bygningum fyri í sosialu nevnd til góðkenningar.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá byggideildini hava MAP Arkitektar gjørt dispositiónsuppskot, sum verður lagt fyri nevndina til góðkenningar.

Sambært uppskotinum verður bygningurin nú 177 m² brutto, og samlaði kostnaðurin íroknað útgerð, innbúgv og 6,25% mvg mettur til kr. 3.348.000.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin og bygginevndin mæla til at góðkenna dispositiónsuppskot og tíðarætlan, dagfest 24. januar 2005, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og bygginevndini.

Kr. 300.000,- eru játtaðar av íløguætlanini fyri 2004. Mælt verður til, at restupphæddin verður játtað við kr. 2.500.000 av íløguætlanini 2005 og kr. 600.000 av íløguætlanini fyri 2006.

**Sosiala nevndin 1. februar 2005:** Ove Mortensen og Heidi Poulsen frá MAP arkitektum møttu á fundinum og greiddu frá dispositiónsuppskotinum, sum varð góðkent við smærri broytingum.

Samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Kollfjarðarnevndin 14. februar 2005:** Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini tann 9. februar 2005.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**36/05** **200001445**

**Uppskot til reglugerð fyri heimið við Vallalíð**

**§ 1**
***Navn og heimstaður***

Navn stovnsins er Heimið við Vallalíð.

Heimið við Vallalíð er kommunalur stovnur, sum hevur heimstað í Tórshavnar kommunu.

**§ 2**
***Endamál***

Endamál stovnsins er at geva minnisveikum fólki úr Tórshavnar kommunu, sum hava tørv á røkt alt samdøgrið eitt heim, har tey fáa røkt, og fjálgað verður um tey.

**§ 3**
***Leiðsla***

Til tess at røkja dagligu leiðsluna á heiminum, setir kommunan ein leiðara. Heimarøktin og Serforsorgin skal kunnast um setanina. Eftir tilmæli frá leiðaranum setir Tórshavnar kommuna fólk í starv, sum skulu arbeiða á heiminum. Sama mannagongd er galdandi, tá starvsfólk verða søgd úr starvi.

**§ 4**
***Starvsfólk v.m.***

Fólk, sum verða sett í starv eftir hesi reglugerð, verða lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið/Kommunala arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

**§ 5**
***Upptøka***

Avgerð um upptøku verður tikin av eini upptøkunevnd.

Upptøkunevndin er fyribils sama nevnd, sum upptøkunevndin fyri Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim og Tjarnargarð. Harumframt er leiðarin á heiminum í upptøkunevndini.

## § 6
## *Fíggjarætlan og roknskapur*

Stk. 1. Roknskaparárið er álmanakkaárið.

Stk. 2. Tórshavnar kommuna ger ársfíggjarætlan fyri heimið, sum verður send Heimarøktini og Serforsorgini til góðkenningar.

Stk. 3. Tórshavnar kommuna fráboðar mánaðarliga góðkendu fíggjarstøðuna til Heimarøktina og Serforsorgina. Góðkenningin skal fylgja roknskaparreglum landsins um góðkenning av játtanarroknskapi. Mánaðarliga fráboðanin skal fylgja kontoskipan landsins.

Stk. 4. Grannskoðaður ársroknskapur við grannskoðarafrágreiðing verður sendur Heimarøktini og Serforsorgini í seinasta lagi 2 mánaðir eftir árslok.

## § 7
## *Eftirlit og ábyrgd*

Tórshavnar kommuna hevur eftirlit og avgerðarrætt á heiminum, tá tað snýr seg um viðurskifti, ið ikki hava við røktina at gera. Heimarøktin hevur eftirlit við røktarviðurskiftunum á heiminum, og hevur fráboðanarskyldu mótvegis Heimarøktini og Serforsorgini.

## § 8
## *Góðkenning og broytingar*

Hendan reglugerð verður sambært § 32 í forsorgarlógini at góðkenna av Almanna- og heilsumálaráðnum, sum eisini skal góðkenna broytingar í reglugerðini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at góðkenna reglugerðina.

**Sosiala nevndin 1. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til um fíggjar-nevndina at góðkenna reglugerðina.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna reglugerðina.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**37/05** **200402103**

**Barnagarður og vøggustova í Nólsoy.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur í sáttmálanum um samanlegging við Nólsoyar kommunu viðtikið at gera ein dagstovn í Nólsoy.

Í Nólsoy er øki sett av til dagstovn, sum skal rúma eini vøggustovu, einum barnagarði og eini frítíðarstovu. Ætlanin er, at hesin stovnur skal standa liðugur um tíðarskeiðið primo 2006. Samlaða barnatalið verður 32 børn í vøggustovu og barnagarði pluss 10 børn í frítíðarskúlan sambært byggiprogramminum. Dagstovnurin verður 437 m² brutto til støddar, og gevur hetta eitt fermetratal, sum er áleið 10 m² fyri hvørt barnið.

Økið er partvíst byggibúgvið.

Samlaði kostnaður verður uml. 6.992.000,00 kr., um roknað verður við 16.000 kr./m². Tað svarar til 6.580.705,88 kr., tá ið 6,25% í MVG verður drigið frá.

**Tilmæli:**
Byggideildin mælir til, at stovnurin verður bjóðaður út í umvendari licitatión, har samlaði prísurin fyri dagstovnin er fastur aljóðandi 6.992.000,00 kr. svarandi til ein prís uppá 16.000 kr./m² við MVG á 6,25%.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2.000.000 av íløgujáttanini á barnaansingarøkinum 2005 til útbjóðing í umvendari licitatión, og at restupphæddin, kr. 4.500.000, verða settar av á íløguætlanini 2006.

**Nólsoyarnevndin 1. februar 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum.

**Mentamálanevndin 2. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum, tó við teirri broyting, at rúm skal verða fyri 4 barnagarðsbørnum afturat fyri sama kostnað. Boðið verður út í almennari heildararbeiðstøku.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**38/05** **200402098**

**Umsókn frá Flogfelag Føroya um keyp av lendi.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við umsókn um umbygging av bygninginum hjá Flogfelag Føroya í Gundadali, hevur eigarin spurt seg fyri, um møguleikan at keypa neyðugt lendi nærindis bygninginum til bilstøðlar, og sum er neyðugt fyri at fáa minka um nettonýtslustigið.

Lógir og ásetingar:
Økið liggur í umráðispartinum C1, Tøtt miðstaðabygging.

Upplýsingar frá fyrisitingini:
Grundstykkið, matr.nr. 1272, er 293 m².

Søkt verður um at keypa 299 m² afturat, so samlaða víddin verður uml 592 m².

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at loyva at Flogfelag Føroya kann keypa 299 m², frá Tórshavnar kommunu, treytað av, at tilkoyring og bilstøðlar kunnu góðkennast av teknisku nevnd.

Mælt verður at beina málið í teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnenvdini og selja p.f. Flogfelag Føroya 299 m² av matr. nr. 1268b fyri kr. 300,00 pr. m² at leggja saman við matr. nr. 1272 sambært kortskjali, dagfest 9. februar 2005/jmp.

Sølan er treytað av, at økið ikki verður girt, og at tað framhaldandi kann brúkast sum alment P-øki.

Eisini samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Býráðið 17. februar 2005:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Leivur Hansen og Hildur Eyðunsdóttir

**39/05** **200402528**

**Renovatión í samanløgdu kommununi**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Nú kommunusamanlegging fer fram, skal støða takast til, hvussu renovatiónin skal skipast í nýggju samanløgdu kommununi.

Greitt verður frá, hvussu renovatiónin er skipað í Kirkjbø/Velbastað, Nólsoy og Hesti.

**Tilmæli:**
Vísandi til pkt. 60 e í fylgiskjali til sáttmála um samanlegging av Tórshavnar og Nólsoyar kommunu, mæla tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini til, at Tórshavnar kommuna tekur upp samráðingar við IRF um at melda Nólsoyar kommunu úr IRF.

Eisini verður mælt til, at samráðingar verða tiknar upp við Sp/f Tom Hellisdal um at víðka verandi sáttmála til at fevna um Kirkjubø/Velbastað, Hest umframt tøming av bingjum úr Nólsoy.

Eisini verður mælt til, at partarnir samráðast um at gera ávísar smærri tillagingar í verandi sáttmálum, soleiðis at hann kann fylgja menningini, sum fer fram innan renovatiónsøkið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 11. november 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini og at beina málið í fíggjarnevndina.

Nevndin samtykti eisini at skipa soleiðis fyri, at bingja verður sett upp til ruddingartiltøk úti í Hesti – eftir tørvi.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Ískoyti:**
Uppskot til avtalu millum Tórshavnar kommunu og sp/f Tom Hellisdal viðvíkjandi innsavning í fyrrverandi Kirkjubøar og Hests kommunum fyriliggur, j. nr. 200402528-7.

Samráðingar við IRF um Nólsoy eru byrjaðar, men eru ikki lidnar. Avtalað er, at fyribils røkir IRF renovatiónina í Nólsoy sum higartil, móti gjaldi.

Notat viðvíkjandi skipan av renovatiónini í Nólsoy fyriliggur, j.nr. 200202528-8.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mælir til at taka undir við uppskot til avtalu millum Tórshavnar kommunu og Sp/F Tom Hellisdal viðvíkjandi innsavning í fyrrverandi Kirkjubøar og Hests kommunum, j.nr. 200402528-7.

Eisini verður mælt til, at Kommunala Brennistøðin fær heimild at yvirtaka innsavningina av burturkasti í Nólsoy, soleiðis sum greitt er frá í notatinum 200402528-8 og at byrjað verður so skjótt sum praktisku viðurskiftini eru fingin upp á pláss.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælunum hjá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini og at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

Nevndin samtykti eisini at senda málið til limirnar í staðbundnu nevndunum til kunningar.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 17. februar 2005:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Jan Christiansen, um at beina máli um burturkasti í Nólsoy aftur í Heilsu- og umhvørvisnenvndina, ið fall við við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini, um at taka undir við uppskot til avtalu millum Tórshavnar kommunu og Sp/F Tom Hellisdal viðvíkjandi innsavning í fyrrverandi Kirkjubøar og Hests kommunum, j.nr. 200402528-7, ið varð einmælt samtykt.

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini um, at Kommunala Brennistøðin fær heimild at yvirtaka innsavningina av burturkasti í Nólsoy, soleiðis sum greitt er frá í notatinum 200402528-8 og at byrjað verður so skjótt sum praktisku viðurskiftini eru fingin upp á pláss, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Greiddu ikki atkvøðu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

**40/05** **200100862**

**Matr. nr. 219 - Knørraneystið.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tann 13. september 2004 samtykti havnanevndin at taka undir við tilmæli frá havnameistaranum, um at kommunan yvirtekur neystið.

Sambært tingbókini er ognin 69 m² til støddar, og á ognini er grótlað neyst - kallað Müllersneystið.

Søgulig lýsing av neystinum er í málinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at taka undir við havnanevndini.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til, at kommunan yvirtekur neystið fyri kr. 150.000,00, og at upphæddin verður mótroknað í skuldini hjá Tórshavnar Havn.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**41/05** **200100862**

**Matr. nr. 223 - Müllerspakkhús.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tann 13. september 2004 samtykti havnanevndin at taka undir við tilmæli frá havnameistaranum, um at kommunan yvirtekur neystið.

Sambært tingbókini er ognin 376 m² til støddar, og á ognini er pakkhús - kallað Müllerspakkhúsið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at taka undir við havnanevndini.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til, at kommunan yvirtekur ognina fyri kr. 1.500.000,00, og at upphæddin verður mótroknað í skuldini hjá Tórshavnar Havn.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**42/05** **200500377**

**Ábøtur í sambandi við nýggja Smyril.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tá nýggi Smyril ikki kann liggja á plássinum undir farstøðini, má hann liggja antin uttast á molanum ella í krókinum undir havnaskrivstovuni.

Ábøturnar umfata:

1) 8 stk fendararastabbar á molanum og undir havnaskrivstovuni.
2) Dýping og trygging av botninum.
3) Ábøtur á dekkið á rampuni undir havnaskrivstovuni.

Ístaðin fyri at gera smærri ábøtur á dekkið á rampuni, er eisini møguligt at breiðka rampuna munandi. Hetta ger umstøðurnar munandi betri at koyra í í land, og báðar rampurnar hjá Smyrli kunnu brúkast. Vansin er, at atløguplássið undir havnaskrivstovuni verður styttri.

Tað er møguligt at brúka verandi rampu við at gera ábøtur á rampuna.

Um ferðafólkini ikki skulu ganga í land eftir hekkurampuni, verður neyðugt at gera eina nýggja landgongd. Landgongdin kemur at ganga inn á tað nýggja trapputornið. SL er sinnað at gera hesa landgongdina

Kostnaðarmeting:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Fendarastabbar: | kr. | 450.000,00 |
| 2. | Trygging av botninum: | - | 3.000.000,00 |
| 3. | Umvæling av rampu: | - | 520.000,00 |
| 4. | Breiðka rampu: | - | 3.450.000,00 |

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
**Ábøtur:** Mælt verður til at arbeiðið, sum í kostnaðarmetingini eru merkt 1, 2 og 3 verða liðugt projekterað og gjørt klárt til útbjóðing. Tó verður eingin fyrireiking gjørd fyri landgangin, sum Strandferðslan letur byggja.

**Havnarnevndin 30. november 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera ábøtur í sambandi við nýggja Smyril er liðugt projekterað.

Fyri at Smyril skal kunna liggja í krókinum við havnarskrivstovuna, er neyðugt at dýpa.

Av tí at bryggjan er gjørd av betonpelum, eru tað avmarkaðir møguleikar at dýpa. Ein partur av grótfylluni verður tikin burtur, og ein „betondýna“ verður løgd ístaðin, sum samstundis skal hindra undirmating av bryggjuni.

Nevnda ”betondýna” er ongantíð brúkt í Føroyum áður, men hevur verið roynd við góðum úrsliti í Norra.

Tað er avmarkað við arbeiðstakarum í Føroyum, sum kenna til havnaarbeiði.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til

at gera fendarastabbar, umvæla rampuna, gera trygdarlista og at gera botnin kláran til betondýnu verður boðið út í innbodnari licitatión millum Byggitek, J. & K. Petersen og Articon.
at standa fyri arbeiðinum at leggja út ”betondýnuna” verður avtala gjørd við norskt felag, sum hevur royndir á økinum.

**Havnanevndin 7. desember 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Licitatión var hildin 10. januar 2005, og inn komu trý tilboð uppá høvuðs-entreprisuna:

| | |
|---|---|
| P/F Byggitek | 3.707.935,00 kr. |
| P/F Articon | 3.197.856,00 kr. |
| PF J.& K. Petersen | 3.656.682,00 kr. |

Tilboðið fyri álegging av ”betondýnu” frá norska felagnum EBMarine er kr. 2.130.000.

Kostnaður fyri projekt og óvantað er mettur til kr. 972.194,00.

Um tikið var av lægsta tilboðnum, hevði hetta givið ein samlaðan kostna upp á 6,3 mió.

Av tí at kostnaðurin fyri loysnina við EBMarine var væl hægri enn mett, hava samráðingar verið við p/f Articon um at leggja gabiónir á botnin, sum verða fyltar við beton.

Hildið verður, at loysnin við gabiónum er ein góð loysn, sum kann gerast fyri kr. 1.132.230,00.

**Tilmæli**:
Havnameistarin mælir til

at taka av lægsta tilboðnum frá p/f Articon upp á kr. 3.197.856,00.

at taka av loysnini við gabiónum upp á kr. 1.132.230,00.
at játta kr. 869.914,00 til projekt/eftirlit og óvantað.

**Havnanevndin 7. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá havnameistaranum, har upphæddin kemur upp á tilsamans 5,2 mió.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 17. februar 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**43/05** **200402713**

**Val av brunanevnd**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært § 4, stk. 4, í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a. sita 3 limir í brunanevndini, sum eru tilnevndir av býar- ella bygdaráði, brunaumsjónarmaður og 1 limur, sum fútin tilnevnir.

Og sambært § 4, stk. 5, í somu lóg velur býar- ella bygdaráðið formannin í brunanevndini millum teir limir, sum býar- ella bygdaráðið hevur tilnevnt.

Formaðurin og í minsta lagi 1 av teimum limum, sum býar- ella bygdaráðið hevur tilnevnt, skulu vera limir í býráðnum.

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið av skrá.

**44/05** **200500393**

**Val av einum limi í nevndina hjá Dr. Ingridar Barnagarði fyri 4 ár.**

Sambært reglugerðina fyri barnagarðin skal kommunan velja 1 lim fyri sítt valskeið.

**Býráðið 17. februar 2005:** Vald varð Malan Nolsøe Samuelsen.

**45/05** **200500394**

**Val av 3 limum í nevndina fyri Sankta Josefs barnagarð.**

Sambært reglugerðina fyri stovnin skal býráðið velja 3 limir, herav 2 eftir tilmæli frá fransikanarsystrunum.

Fransikanarsystrarnar mæla til at velja Bjarna Skaalum og Mariu Stinissen.

**Býráðið 17. februar 2005:** Vald vóru Bjarni Skaalum, Maria Stinissen, Ragnar Magnussen.

**46/05** **200500395**

**Val av einum limi í nevndina hjá Vøggustovuni og Barnagarðinum á Konmansmýru fyri 4 ár.**

Sambært reglugerðini fyri stovnin skal kommunan velja 1 lim fyri sítt valskeið.

**Býráðið 17. februar 2005:** Vald varð Beinta Nattestad.

**47/05** **200500396**

**Val av 3 limum í nevndina fyri barnagarðin Vípuna.**

Sambært reglugerðina fyri barnagarðin skal býráðið velja 3 limir fyri sítt valskeið, herav 2 eftir tilmæli frá adventistasamkomuni.

Adventistasamkoman mælir til at velja Tonnie Jensen og Jens Vilhelm Danielsen.

Býráðið 17. februar 2005: Vald vóru Tonnie Jensen, Jens Vilhelm Danielsen og Hallstein Sigurðsson.

**48/05** [200500397]

**Val av 4 limum í nevndina fyri frítíðatstovuna í KFUM.**

Sambært reglugerðini fyri frítíðarstovuna skal býráðið velja 4 limir fyri sítt valskeið, herav 3 eftir tilmæli frá KFUM.

KFUM mælir til at velja Nicolinu Højgaard, Hera Joensen og Elisabeth Hansen.

**Býráðið 17. februar 2005:** Vald vóru Nicolina Højgaard, Heri Joensen, Elisabeth Hansen og Ingibjørg Heindriksdóttir.

**49/05** [200500175]

**Val av 6 limum í nevndina fyri grunnin Aberdeen-Tórshavn**

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið av skrá.

**50/05** [200500176]

**Val av 6 limum í nevndina fyri grunnin Stavanger-Tórshavn**

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið av skrá.

**51/05** **200500159**

**Val av leigunevnd fyri 2 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sbrt. § 12 í "Midlertidige bestemmelser om lejeforhold" frá 2. desember 1940 velur býráðið í leigunevndina 2 bygningskønar limir, og skal annar teirra vera húsaeigari, meðan hin skal vera leigari.

Herumframt verða valdir 3 tiltakslimir fyri hvønn av limunum.

**Býráðið 17. februar 2005:** Vald vóru

**húsaeigari:**
*fastur limur:*
Johan Mortensen (Mýrusnýpuvegur)

*tiltakslimir:*
Tórhallur Áslakksson
Meta Palle
Hilmar Joensen, Nólsoy

**leigari:**
*fastur limur:*
Mikael Jensen

*tiltakslimir:*
Susan Brockie
Nina Brockie
Leivur Johannesen

**52/05** **200500402**

**Val av 3 limum í býarsavnsnevndina.**

Sambært viðtøkunum hjá býarsavninum velur býráðið 3 limir í nevndina.

Valskeiðið er 4 ár og fylgir valskeiðinum hjá býráðnum.

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið av skrá.

**53/05** **200402442**

**Val av 7 limum í skattakærunevndina fyri 4 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð frá 21. desember 2004 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar, skal býráðið velja minst 7 limir og tiltakslimir.

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**17. februar 2005** | Blað nr.:<br>**6111**<br>Formansins merki: |

Fyrsti fundur hjá nývaldu nevndini verður fyrireikaður av einum av limunum. Kommunan ger sjálv av, hvør tað skal verða.

**Býráðið 27. januar 2005:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Napoleon Joensen | Ísak N. Jacobsen |
| Brynhild í Jákupsstovu | Johan Mortensen |
| Johan Samuelsen | Jógvan Martin Mørk |
| Elin H. Joensen | Joan Ziskason |
| Elin í Jákupsstovu | Jan Christiansen |
| Jógvan Thomsen | Sjúrður Olsen |
| Annfinn Brekkstein | Lisbeth L. Petersen |

**Ískoyti:**
Napoleon Joensen hevur í skrivi, dagfest 13. februar 2005, boðað frá, at tað ber honum ikki til at taka við valinum.

**Býráðið 17. februar 2005:** Valdur varð

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimur:** |
|---|---|
| Ísak L. Jacobsen | Ragnar Magnussen. |

**FUNDUR LOKIN KL. 19:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |